gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Treðum lættliga dansin



**Nú komið er hægst á summarið, verður aftur farið upp á gólv við luttøku úr øllum landinum. Dansináttin í Norðurlandahúsinum verður komandi leygarkvøld**

DANSUR
*Edvard Joensen*

Minni enn tveir mánaðar eftir væleydnaðu landsdansistevnuna, sum í ár var í Havn, stevna Sláið Ring og Norðurlandahúsið aftur dansarum til stevnu. Hesaferð er tað dansináttin í Norðurlandahúsinum, sum er á skránni.

Dansináttin í Norðurlandahúsinum er afturvendandi tiltak, sum Norðurlandahúsið og landsfelagið føroyskum dansi at frama, Sláið Ring, í felag skipa fyri.

Tað er soleiðis, sigur Sláið Ring, at felagið útlisiterar dansináttina, so at siga. Tað vil siga, at ymsu dansifeløgini í landinum standa sum vertir fyri hesum tiltakinum, sum tó altíð er í Norðurlandahúsinum.

Í ár verður tað Sumbiar Dansifelag, sum fer at verða vertur. Tað merkir í stuttum, at sumbingar leggja fyri hetta kvøldið. Men so verður annars, sum vanligt er í føroyskum dansi, at hvør byrjar, sum fyrstur og sterkastur er. Ivaleyst fer eisini her at verða kapping um at sleppa framat.

Tað eru 16 dansifeløg, sum eru limir í landsfelagnum Sláið Ring. Og tað er við tí fyri eyga at fáa hesi feløg meira aktiverað, at skipað verður soleiðis fyri, at tey upp á skift standa sum vertir fyri dansináttini í Norðurlandahúsinum.

Dansináttin í Norðurlandahúsinum byrjar leygarkvøldið komandi, tann 7. juli, klokkan 22, og hildið verður á til klokkan trý sunnumorgunin. Kostnaðurin verður kr. 50,- fyri hvønn.

# Leygardagur í Vágsbotni

**Reyði Krossur Føroya fer at luttaka í tiltaki, sum leygardagin verður hildið í Vágsbotni. Har verður millum annað harmonikutónleikur og loppumarknaður**

HUGNALØTA
*Edvard Joensen*



Leygardagin 7. juli skipa handlar og feløg fyri serligum hugnatiltaki í Vágbotni. Millum onnur verður Reyði Krossur Føroya við í tiltakinum.

Reyði Krossur Føroya sigur í tíðindaskrivi, at á hugnatiltakinum verður millum annað harmonikuspæl, tombola og loppumarknaður við bókum.

Reyði Krossur Føroya fer at skipa fyri loppumarknaðinum, og eru fólk, sum hava gamlar bøkur liggjandi, sum tey vilja sleppa av við, eru tey vælkomin at lata Reyða Krossi tær. Tær verða so seldar á loppumarknaðinum i Vágsbotni leygardagin.

Til ber hjá fólki at støkka inn á gólvið í hølunum hjá Reyða Krossi í Vágsbotni hóskvøldið frá klokkan 20.00, tá opið er.

Annars er Reyði Krossur Føroya við í fleiri tiltøkum í summar. Serliga eru tað samarittarnir og fyrstuhjálpararnir, sum eru virknir, tá ymisk tiltøk eru.

Í skrivandi stund eru tveir samarittar frá Reyða Krossi Føroya saman við øðrum samarittum úr Danmark við á Roskilde Festivalinum, har teir ganga vakt og veita eina hjálpandi hond, um okkurt er áfatt.

Eisini á ólavsøku fara samarittarnir hjá Reyða Krossi at ganga vakt. Tað verður, meðan felagssangurin verður á Vaglinum ólavsøkukvøld, at samarittarnir fara at verða hjástaddir. Tað verða teir eftir áheitan frá Tórshavnar Kommunu.

Í kvøld verður fundur, har tosað fer at verða um millum annað hesa vaktarskipanina, sigur Reyði Krossur Føroya í tíðindaskrivi.

# Tryggið ferðina

**Nú summarfrítíðin er í hæddini, og fólk fara út í heim at ferðast, er umráðandi at hava tryggingarviðurskiftini í lagi, sigur tryggingarfelagið Trygd í tíðindaskrivi**

FERÐATRYGGINGAR
*Edvard Joensen*

Tryggingarfelagið Trygd minnir í tíðindaskrivum um dagarnar fólk á, at skilagott er at tryggja seg, áðrenn farið verður í útheimin at ferðast.

Um tú fert at ferðast í einum vanligum ferðalagi, er skilagott at hava vanliga ferðatrygging, sum gevur tær rætt til ymisk ting, tú annars skalt gjalda fyri, um eitthvørt hendir á ferðini.

Verður tú til dømis sjúkur og noyðist undir læknahond, fyri ikki at tala um sjúkrahús, kann tað gerast ein kostnaðarmikil søga, um eingin ferðatrygging er teknað, vísir Trygd á.

Sagt verður, at ferðatryggingin kann teknast sum ískoyti til familjutrygging ella sum einstaklingatrygging til ta ávísu ferðina.

Eisini tey, sum fara at ferðast við egnum bili, eiga at hugsa um trygdina, áðrenn farið verður. Neyðugt er við bæði grønum og reyðum kortum fleiri staðni úti í heimi.

Í Danmark, Noreg og Svøríki, eru kortini ikki kravd, meðan tilmælt verður at hava tey, um farið verður til stóran part av Europa annars, og kravt verður, at tey skulu vera við í ávísum øðrum londum. Og so eru uppaftur onnur lond, har tey als einki virði hava. Eru ógyldug.

Verður farið til Íslands, ES og Miðeuropa, verður tilrátt at hava grøna kortið við. Eystureuropa krevur tað, meðan tað er ógyldugt í eitt nú Russlandi og Jugoslavia.

Men alt hetta fæst nágreiniligt at vita um, tá ein vendir sær til tryggingarstovurnar.

# Fløga við Eleazars brudefærd

**Nýggj fløga við vísum til brúðardans er komin á marknaðin. Tað er plátuhandlilin hjá Hansemann, sum hevur givið út**

FLØGUÚTGÁVA

Danska og føroyska Brúðarvísan eru nú at fáa á fløgu saman við øðrum vísum, sum brúktar verða – ella hava verið – í brúðardansi.

Tað eru upptøkur við Dansifelagnum í Havn, sum gjørdar vórðu í 1993, sum nú eru givnar út á fløgu. Upptøkurnar eru gjørdar í Hornahúsinum, har Dansifelagið heldur til í dag.

Talan er um tvífløgu, har báðar Brúðarvísurnar eru á saman við Kong Hans og Fisken tager sin føde i vand, sum vanligar hava verið í brúðardansi í Føroyum.

Tað er Jónheðin Tróndheim, sum hevur digitaliserað upptøkurnar og gjørt tær klárar til fløgubrenning.

Við fløgunum fylgja eisini tekstirnir til Brúðarvísurnar, so nú skuldi ligið væl fyri hjá fólki at lært seg Brúðarvísurnar bæði á føroyskum og donskum, sigur plátuhandilin hjá Hansemann í tíðindaskrivi.

Á fløguhúsanum er eisini mynd av skiparunum, eins og teir greiða frá um teirra viðurskifti í samband við dans og kvøðing.

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Kvøldlot er vekk

**Eftir at hava misprýtt grannalagið í nøkur ár vórðu restirnar av bygninginum, har Kvøldlot helt til fyrr, rivnar niður í gjár.**

*Rúnar Reistrup*

Bygningurin, har Kvøldlot fyrr helt til, hevur í áravís staðið í hálvum gekki – einu løtuna uttan tak og næstu løtuna sum tveir veggir. Men í gjár var bygningurin so knappliga vekk.

Ætlanin hjá Høgna Danielsen, sum eigur bygningin, hevur leingi verið at gjørt bygningin, ella í hvussu er staðið har bygningurin stóð, til eitt miðpunkt fyri býar- og náttarlívið í Havn aftur, eins og tað var fyrr, tá Kvøldlot var karmur um tað nógva av náttarlívinum í Havn.

Men tað hevur gingið strilti við at semjast við grannar og Tórshavnar Býráð um hvussu og hvat.

Hóast nakað av bygninginum var nýstoypt, so bað eigarin Tórshavnar Býráð um loyvi at bróta allan bygningin niður, og í gjár var bygningurin so burtur.

Ætlanin er at byggja nýtt hús á grundina, sum skal hýsa einum náttklubba og einari matstovu.



# Kendur føroyskur súkklari deyður



*Dagin eftir at Eyðun Poulsen hevði luttikið í súkklukapping, doyði hann ógvuliga brádliga*

**47 ára gamli Eyðun Poulsen úr Havn doyði ógvuliga brádliga sunnudagin. Dagin fyri hevði hann verið í súkklukapping í Fuglafirði. Eyðun Poulsen var við á tí súkklulandsliðnum, sum fekk besta úrslitið nakrantíð á Oyggjaleikunum á Gibraltar í 1995**

DEYÐSFALL
*Stefan í Skorini*

Tað hongur ein dapur dámur yvir føroyskum súkklarum. Teir hava verið fyri svárum missi og eru skelkaðir. Felagi teirra, Eyðun Poulsen, ið hevur verið ein av grundstuðlunum í føroyskari súkkluítrótt, er brádliga tikin frá teimum.

– Eyðun Poulsen hevur verið ein hornasteinur og ein ógvuliga trúgvur stuðul í súkklufelagnum. Hann var altíð ágrýtin og spardi seg ikki, tá okkurt skuldi gerast í felagnum, sigur Gunnar Dahl-Olsen, formaður í Tórshavnar Súkklufelag.

Eyðun Poulsen luttók í súkklukappingini, sum var á Varmakeldu í Fuglafirði, og hann endaði á fimta plássi. Hann gramdi seg um fepur undan kappingini, men fullførdi og hjálpti eisini til at rudda av aftaná.

– Vit í súkklufelagnum eru skelkað, og eg vænti, at hetta fer at seta sín dám á oyggjaleikirnar og súkklukappingar, sum standa fyri framman, heldur Gunnar Dahl-Olsen.

### Vann bronsu í 1995

Eyðun Poulsen hevur íðkað súkkling í fleiri ár, og hann var eisini við, tá súkklulandsliðið fekk sítt besta úrslit í oyggjaleikahøpi higartil.

Tað var í 1995, tá oyggjaleikirnir vóru á Gibraltar. Føroyska landsliðið fekk tá bronsumerki í einkultstarti. Við á tí landsliðnum vóru Bogi Christiansen, Gunnar Dahl-Olsen, Jóhann Brend, Rógvi Johansen og Eyðun Poulsen, sáli. Í hesum tíðarskeiðnum var Eyðun Poulsen uppá sítt besta sum súkklari.

Umframt bronsumerki hjá liðnum fekk Bogi Christiansen bronsu í býarkoyring, og Gunnar Dahl-Olsen fekk silvur í 100 kilometrum. Landsliðið fekk sostatt trý heiðursmerki á teimum leikunum, og tað er besta úrslitið hjá føroyskum súkklarum. Í hesi vikuni fer súkklulandsliðið til Isle of Man at kappast, og tey hava óivað Eyðun í tonkunum.

Eyðun Poulsen arbeiddi dagliga í Keypssamtøkuni í Hoyvík, har hann hevði goymsluna undir hond. Eyðun Poulsen átti fýra børn.

OKKA GOKKA

GUMMI KLOKKA

ERLING PERLING

???